# Royna at lokka almenna umsiting suður á Tvøroyri

**Tvøroyrar Kommuna fer helst at flyta umsitingina og samstundis er ætlanin at bjóða stóra bygningin hjá kommununi fram til almenna umsiting**



*Hendan nýmótans skrivstovubygningin mitt á Tvøroyri, ætlar Tvøroyrar Býráð nú at bjóða fram til almenna umsiting. Hugsað verður m.a. um ta yvirskipaðu umsitingina, sum skal gerast, nú barnaforsorgin verður løgd undir kommunurnar at umsita*

KOMMUNUMÁL
*ÁkiBertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Tvøroyri:** Tvøroyrar Býráð fer nú at royna at lokka almenna umsiting suður á Tvøroyri.

Í tí sambandinum er ætlanin at bjóða ráðhúsið mitt á Tvøroyri fram til almenna umsiting.

Nú kommunan hevur lagt fíggjarætlanina fyri næsta ár, hevur hon sett 500.000 krónur av til at gera bygningin ístand, sum kommunan eigur inni á Hvítanesi.

Tað er bygningurin, sum heilsølan hjá Poul Hansen helt til í.

Talan er um eini søgulig hús, har nógv virksemi hevur verið í gomlum døgum. Hartil liggur húsið sera væl fyri, niðri við sjóvarmálan, við bátabrúgv niðanfyri, stórum fiskaplássi rundanum og góðum møguleikum at gera parkeringsplásss.

Kommunan eigur húsini og fyri at tey ikki skulu forfarast, ætlar kommunan nú at gera álvara av at gera tey ístand.

Kommunan hevur bjóðað landinum, húsini til nýggjan heilsuskúla, men Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at eftir teimum ábendingum, kommunan hevur fingið frá landsumsitingini, er ikki áhugi fyri at gera skúlan har.

– So skjótt vit hava fingið tað endaliga staðfest at landið ikki tekur av, fara vit at kanna aðrar møguleikar at fáa nyttu burturúr húsunum, sigur borgarstjórin.
Enn er ikki endaliga gjørt av, hvat húsið skal brúkast til.

– Men tað er nógv, sum talar fyri, at kommunan flytir sína umsiting inn har og at hetta sostatt verður nýggja ráðhúsið á Tvøroyri.
Men Kristin Michelsen sigur, at húsini eru so mikið stór, at har kann nógv annað verða afturat umsitingini hjá kommununi.

Fyrr hevur verið nevnt at hava ymiskt frítíðarvirksemi í húsinum.

### Bjóða seg fram

Spurningurin er so, hvat húsini, sum kommunan nú húsast í, skal brúkast til.

Tvøroyrar Kommuna heypti hendan bygningin frá Føroya Banka fyri ikki so langari tíð síðani.

Kristin Michelsen sigur, at húsini kunnu so altíð seljast.

Men í ryrstu syftu er tað ikki ætlanin.

Kristin Michelsen sigur, at ætlanin er at bjóða húsini fram til almenna umsiting í eini roynd at lokka almenna umsiting út um landið at vera.

Hann sigur, at eitt, sum býráðið hevur hugsað um at bjóða húsið fram til, er til tað yvirskipaðu umsitingina ið krevst, nú barnaforsorgin skal flytast undir kommunurnar at umsita.

– Í tí sambandi skal ein nýggj umsiting skipast og vit ætla okkum at bjóða henni hesi nýmótans skrivstovuhøli, sum eisini eru í góðum standi, at vera í.

– So er í hvussu so er møguleikin at flyta umsiting út um landið, heldur enn at troðka alt saman í Havn, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.



*Hesi húsini inni á Hvítanesi liggja serliga væl fyri og hetta verður helst nýggja Ráðhúsið á Tvøroyri. Tvøroyrar Kommuna fer nú at gera húsið ístand og helst fer umsitingini hjá kommununi at flyta inn í tey*

# Húski við børnum á Tvøroyri fáa ein lætta

**Fáa staðni hava fólk verið so hart skattað sum á Tvøroyri, men næsta ár verður tað eitt sindur léttari hjá teimum húskum, sum hava børn**

SKATTATRÝST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Tvøroyri verður eitt sindur léttari at búgva næsta ár hjá teimum, sum hava børn*

**Tvøroyri:** Fáa staðni hava fólk verið so hart skattað sum á Tvøroyri. Men tað hevur sjálvsagt ikki verið til stuttleika. Kommunan hevur verið tann mest skuldarbundna í landinum uppá seg og tað hevur hevnt seg aftur í kommunuskattinum.

Í nógv ár hevur kommunuskatturin verið so høgur, sum hann kann eftir lógini, nevniliga 23%.

Men síðani er hann lækkaður niður í 22,5%

Og aftur næsta ár fer tað at vera eitt sindur léttari hjá teimum húskum, sum hava børn.

Nú Tvøroyrar Býráð hevur lagt fíggjarætlanina fyri næsta ár, hevur Býráðið samtykt at hækka barnafrádráttin 1.000 krónur um árið.

Barnafrádrátturin hevur verið 3.000 krónur fyri hvørt barnið, men næsta ár verður hann sostatt 4.000 krónur.

Harumframt hevur landið lækkað landsskattin 0,9% í sambandi við, at barnaforsorgin skal leggjast undir kommurnar at umsita. Tær kommunur, sum vildu, kundi sostatt hækka kommunuskattin í mesta lagi 0,9% fyri at fáa útreiðslurnar til barnaforsorgina inn aftur.

Men hetta hevur Tvøroyrar Kommuna ikki lagt upp fyri.

Fyribils verður kommunuskatturin ikki hækkaður við tí fyri eyga at kommunan skal átaka sær barnaforsorgina.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at tað fer kommunan at venda aftur til seinni, verður tað neyðugt.

### Seyður, vatn og tey eldru

Annars fer Tvøroyrar kommuna næsta ár at brúka eina millión krónur uppá at vetrarfriða ein part av býnum fyri seyð um veturin.

Nógv illneitast inn á seyðin, sum gongur um geilar og tún allan veturin, men nú er so ætlanin at fáa seyðin burturúr úr býnum.

Borgarstjórin veit ikki, hvussu langt hendan milliónin røkkur, men ætlanin er so at byrja mitt á Tvøroyri. Samráðingar skulu nú vera við hagarnar um málið, tí seyðurin hevur rætt til bit oman í mølina um veturin og verður tað tikið frá høgunum, hava teir rætt til endurgjald.

Somuleiðis ætlar Tvøroyrar Kommuna at halda fram við vatnleiðingini inn í dalin í Trongisvági. Næsta ár er 800.000 krónur settar av til endamálið og tá ið tað er gjørt, restar ein kilometur í at vatnveitingin er liðug.

Ætlanin er so at gera eina byrging og eina vatngoymslu inni í dalinum, heilt inni við tunnilin til Hvalbiar.

Hetta er fyri at tryggja nóg mikið av reinum vatni, ikki minst er brúk fyri nógvum, reinum vatni, skuldi okkurt oljuvirksemi tikið seg upp á Drelnesi. Somuleiðis hevur kommunan sett eina lítla millión av til at byggja havnalagið út fyri.

Tvøroyrar býráð hevur eisini sett 1,3 millión av til eldrasambýli, men um eini hús verða keypt, ella um tað verður bygt nýtt, veit borgarstjórin ikki enn.



# Jógvan S broytti kallimerki

**Hóast kallimerkið er samleikin hjá skipinum, hevur Jógvan S ikki sama kallimerkið, sum hann hevði, áðrenn hann var seldur norskum felag. Talan er tí um nýtt skip, sigur Skipaskrásetingin. Men tað heldur Skipaeftirlitið ikki**




*Jógvan S hevur kallimerkið XPSM málað á síðuna. Ågot 1 hevði kallimerkið XPZD*

*Mynd: Edvard Joensen*

SAMLEIKI
*Edvard Joensen*

Jogvan S skifti kallimerki, tá hann varð skrásettur av nýggjum í føroyska skipaflotanum. Tí skuldi hann eisini gingið undir somu treytir sum eitt heilt nýtt ella influtt skip, sigur Skipaskrásetingin. Men Skipaeftirlitið heldur ikki, at tað er neyðugt sambært altjóða mannagongdum.

Ymsir myndugleikar eru ósamdir á máli, hvørt tað er loyvt einum skipi at skifta kallimerki, uttan at skipið skal viðgerast sum eitt heilt nýtt skip.

Kallimerkið hjá einum skipi er at meta javnt við persónstalið hjá einum fólki. Tað er sjálvur samleikin hjá skipinum.

So greitt verður tað sett upp, tá greinast skal, hvat kallimerkið hjá einum skipi hevur at týða.

Tá nógv umtalaða skipið, Jógvan S, í síni tíð varð strikað úr føroyska skipaflotanum, varð tað undir navninum Ågot 1 og við kallimerkinum XPZD, Men tá sama skip nakað seinni aftur kom í flotan, var tað við kallimerkinum XPSM.

Tað samsvarar ikki við uppáhaldið um, at talan er um sama skip, siga fólk, sum skil hava á slíkum. Tí kallimerkið er tað sama sum eitt persónstal ella eitt skrokknummar, sum bara hetta eina skipið hevur, verður sagt.

### P-talið

Kallinummarið verður latið skipinum og skrásett alt eftir, í hvørjum landi skipið hoyrir til, sigur Petur Hans Dahl, varaskúlastjóri á Føroya Sjómansskúla.

Kallimerkið verður høgt í lúkukarmin og fylgir so við skipinum. Tað er tað sama sum p-talið hjá skipinum, sigur hann.

Er talan um, at skip skiftir kallimerki, er samstundis talan um, at vit hava við eitt nýtt skip at gera, sigur Petur Hans Dahl. Tá er tað heilt annar identitetur, vit tosa um.

Men hann vísir á, at tað er ikki bara kallimerkið, sum í dag verður brúkt at eyðmerkja eitt ávíst skip við.

Síðan 1. februar í fjør hava øll skip eisini eitt sonevnt MMSI nummar, sum skásett verður eitt nú við neyðarkall. Hjá føroyskum skipum byrjar hetta níggjusiffraða nummarið altíð við 231.

Eins og Petur Hans Dahl, varaskúlastjóri á Føroya Sjómansskúla, er Heðin D. Poulsen, stjóri á Føroya Skipaskráseting, heldur ikki í iva um, at tá eitt skip hevur skift kallimerki, er talan um eitt nýtt skip, sum skal lúka allar tæt treytir, lagdar verða á eitt nýbygt ella eitt innflutt skip.

Um tað serstaka málið við Jógvani S. sigur hann, at skipið undir navninum Ågot 1 varð strikað úr føroysku skrásetingini. Og tað stendur heilt greitt í lógini um skráseting av skipum, at kemur skip inn í føroyska flotan, skal tað ganga undir somu reglur sum skip, ið fyrstu ferð verða skrásett. Jógvan S hevur annað kallimerki, enn Ågot 1 hevði, og tí skal skipið ganga undir somu trygdarkrøv og treytir annars, sum eitt nýtt ella innflutt skip, hóast tað ikki hevur verið skrásett í øðrum landi.

– Skipið hevur verið burtur úr okkara skráseting, og kemur aftur við ørðum samleika. Tí má tað undir somu krøv sum øll onnur skip í slíkari støðu, sigur hann.

### Ósamdur

Men leiðarin á Skipaeftirlitinum, Óli hans Hammer Olsen, er ikki samdur við teir báðar. Hann sigur, at Jógvan S er sama skip sum Ågot 1, og at skipið hevur siglingarloyvi heilt fram til 20. mars 2006 og tí ikki hevur fyri neyðini at ganga undir nøkur serliga strong krøv sum nýtt ella innflutt skip.

At skipið hevur skift kallimerki, hevur ongan praktiskan týdning, sigur hann og vísir á, at onnur skip, sum eitt nú fara undir FAS skipanina, eisini skifta kallimerki. Tað er bara ein tekniskur spurningur. Bara pappír, sum hann tekur til.

Spurdur eftir lógarheimildini til at taka slíka avgerð, sigur hann, at talan er um eina avgerð, hann sum leiðari á Skipaeftirlitinum hevur tikið, grundaða á altjóða arbeiðshátt, sum fyriskrivaður er í relgugerðum og ikki í serstakari, nationalari lóg.

– Tað var als ikki JógvanS, sum fekk góðkenning frá Skipaeftirlitinum at koma aftur í flotan, vísir Óla Hans Hammer Olsen á. Tað varð gjørt, tá eitt heilt annað felag, sum tó ikki keypti skipið, bað um eitt slíkt til Ågot 1, sum tá lá á klaksvík. Seinni er skipið so aftur skrásett undir navninum Jógvan S og við øðrum kallimerki enn Ågot 1 hevði.

Men ógreiða er kortini um, hvørt Jógvan S yvirhøvur hevur loyvi at sigla. Tí sambært Skipaskrásetingini er talan um heilt annað skip, løgfrøðiliga sæð, enn Jógvan S, ið hevur fingið siglingarloyvi fram til 20. mars 2006.

Tað siglingarloyvið er útskrivað til Ågot 1 við kallimerkinum XPCD (sum tó ivaleyst er ein slagvilla, ið skal vera XPZD, blðm.) og ikki til Jógvan S, sum hevur kallimerkið XPSM.

Og tað eru so tvey ymisk skip, heldur skrásetingin fast við.



Fartstilladelse
Sailing Permit
DANMARK
ÅGOT 1

*Siglingarloyvið, sum Skipaeftirlitið hevur givið, er stílað til heilt annað skip enn Jógvan S - XPSM*